# SETURSTOKIÐ

## Søgan

Seturstokið byrjaði sum ein norðurlendsk verkætlan, og var ein partur av Biophilia verkætlanini, sum íslendski formansskapurin í Norðurlandaráðnum setti á skrá í 2015. Biophilia verkætlanin er ein tvørfaklig undirvísingarætlan, sum sameinir tónleik, teldlar, náttúruvísindi, kreativitet og í Føroyum hava vit eisini tikið hugvísindi við.

Við Seturstokinum eru vísindafólk, sum fara út á skúlar at hava eina øðrvísi skúladag, ofta skipað sum verkstøð. Í Íslandi hevur hesin háttur at fara út á skúlar verið brúktur síðan 2011, og kom í lag tí tey í Íslandi hava eina siðvenju fyri at hava skeið fyri skúlabørnum um summarið. Hagtøl frá hesum summarskeiðum vístu, at av teimum børnum, sum luttóku í summarskeiðum, vóru munandi fleiri, sum komu at ganga á Háskóla Íslands, enn um tey ikki høvdu luttikið á summarskeiði. Tá Háskóli Íslands fylti 100 ár, vildu tey víðka tilboðið til skúlar og fóru tí at ferðast við verkstovum kring alt landið. Tað vildi so til, at føroyska Seturstokið byrjaði júst tá Fróðskaparsetur Føroya fylti 50 ár.





## Náttúruvísindi og kreativitetur – dømi

Ljós og litir er eitt tvørfakligt evni, sum hevur verið viðgjørt, serliga hvussu litir broytast, tá teir verða settir saman. Hetta kann vísast við ymiskt littum ljósi, men til søguna hoyrir eisini prenttøkni (rastur), litblandingar, frekvensir í mun til ljóð og ljós, og hvussu eygu lesa litir og ljós.

## Háttalag

Í Seturstokinum verður strembað eftir, at so nógv fakøki eru umboðað sum gjørligt, og at hesi verða miðlað á ein rannsakandi og kreativan hátt. Náttúruvísindi eru á ymsan hátt meiri natúrlig í verkstovum, har rannsakandi læringarstílurin er ráðandi, men í kreativu lærugreinunum og føroyskum hava ymsar royndir verið gjørdar til verkstovur, har rannsakandi og kreativir arbeiðshættir hava verið brúktir.



Seturstokið í Nólsoy 30. okt. 2015 • **Dreingirnir standa spentir og bíða at royna, at eldur verður settur á eina skúmblanding av uppvaskisápu og tendraragassi. Armurin verður gjørdur vátur, áðrenn skúmið verður tikið upp í hondinum og eldur settur á**

Seturstokið hevur verið kring alt landið og konseptið er, at komið verður við øllum tilfarinum, venjingarnar og tilfarið verður gjørt klárt at taka ímóti næmingum, og so kemur ein hópur í senn inn í verkstovuna. Hesar verkstovur verða so endurtiknar 3 ella 4 ferðir við nýggjum næmingum.

Í føroyskverkstovum hava næmingarnir m.a. gjørt teknifilm, yrkt, savnað orð, skrivað sangtekst, sett einfaldan tónleik til, gjørt listarligar installatiónir við endurnýtslutilfari og talgilda postarenning.

Seturstokið í Hoyvíkar skúla 19. okt. 2017 • **Næmingarnir hava fingið eitt søguborð og eina frágreiðing um dálking. Uppgávan hjá teimum var at gera ein teknifilm, sum snúði seg um at savna burturkast inn. Læringaramboðini eru ein iPaddur við appini FilmX, legofigurar og leiktjøld. Næmingarnir gera sjálvir søguna við støði í søguborðinum.**

**21. aldar føleikakrøv**, sum í stóran mun liggja til grund fyri Pisa og øðrum verkætlanum og átøkum hjá OECD, vísa á, at tey krøv, sum 21. øld setur til vitan og førleikar, eru nøkur heilt onnur enn frammanundan. Staðfest verður, at samfelagið hevur flutt seg frá ídnaðarsamfelagi til vitanarsamfelag, og tað hevur sína ávirkan á læruformar og hvørji krøv verða sett til undirvísing.




**21. aldar hegnisfrymil. Niðaru ringarnir vísa ytru karmarnar, sum eru fortreytir og prakisumstøður fyri læringarrúmið. Ovaru ringarnir vísa teir førleikar, sum næmingar skulu ogna sær, skulu teir virka í vitanarsamfelagnum.**

Yvirskipað snýr henda broyting seg um, at 21. aldar næmingurin skal duga kritiskt at handfara vitan, hugsa og fremja úrtøkiliga/abstrakta vitanarhandfaring, samskifta, samstarva, hugleiða og fyrireika seg til eitt lív við lívlangari læring. Harumframt eru eftirmeting og málan av vitan týðandi dygdarkrøv, sum eyðkenna og ávirka 21. aldar førleikakrøv. Hesi viðurskifti ávirka harumframt læringarumhvørvið, herundir lesiætlanir, undirvísing, amboð, lærutilfar og eftirmetingar.





**Seturstokið í Hoyvíkar skúla var sprottið úr samstarvi á Námsvísindadeildini millum linjulærugreinarnar náttúru&tøkni og føroyskt, har evnið var darwinisma, økologi og burðardyggleiki. Verkstovurnar, har næmingarnir skuldu skapa list, brúktu endurnýtslutilfar.**

**Vár í Ólavsstovu & Erla Olsen**

Námsvísindadeildin

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA